# Latið aðrar fiska fyri okkum

**– Hví skulu vit fiska fiskin sjálvi? Hví gera vit ikki sum við oljuni og lata aðrar taka fiskin upp fyri okkum og fáa pengar afturfyri, spyr hvalvíkingurin, Jákup W. Hansen, sum lesur til bachelor í Danmark**

*Skulu vit fiska fiskin sjálvi, ella skulu vit lata aðrar gera tað fyri okkum eins og við oljuni, spyr Jákup W. Hansen, sum býr í Esbjerg*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



– Vit plaga at siga, at føroyingar liva av fiski, og sambært hagtølun er hetta rætt. Men hvussu ofta hoyra vit ikki, at fiskivinnan er eitt ótrygt grundarlag at byggja tjóðina á, tí eingin veit, hvussu fiskiskapurin verður í framtíðini?

Soleiðis sigur Jákup W. Hansen, sum býr í Esbjerg. Hann hevur lisið til datamatikara og lesur nú til bachelor of science á lærdum háskúla.

– Hava vit í huga, hvussu stórt alt okkara havøki er, og hvussu nógv ríkidømi svimur her, kundi eg hugsað mær, at her var ríkiligt til allar føroyingar.

### Hví lata vit ikki aðrar fiska?

Jákup, sum hevur sent Sosialinum eitt e-bræv, ivast í, um tað er rætt av okkum føroyingum at satsa uppá at fiska sjálvi. Hann heldur, at fiskimenninir kundu gjørt okkurt annað, sum var tryggari og kanska betri enn at »bekymra« seg um fiskiskapin. Men neyðugt er at skipa okkum ógvuliga væl, skulu vit selja fiskirættindini til aðrar.

– Og sjálvandi kundu vit fiskað nakað sjálvi, men her eigur at vera so nógv ríkidømi, at vit kundu selt ein stóran part til aðrar.

Hin møguleikin er, heldur Jákup, at vit føroyingar slett ikki fiska, men lata aðrar taka fiskin upp fyri okkum, samstundis sum vit fáa pengar fyri fiskirættindini afturfyri.

– Minkar burtur av einum fiskaslagi, mugu tað vera onnur fiskasløg, sum vit kunnu selja øðrum, soleiðis at vit altíð hava eina inntøku av at selja hesi rættindi.

### Hvat halda tit um prinsippið?

Jákup spyr, hvat føroyingar halda um hetta prinsippið.

Hann vísir á, at verður olja útvunnin úr føroysku undirgrundini, fara vit ikki at taka hana upp sjálvi, men fara líkasum at selja hana til oljufeløgini og fáa pengar afturfyri.

– Eg haldi, at soleiðis kundu vit eisini gjørt við fiskin í føroyskum sjógvi. Tað hevði givið okkum eitt breiðari lívsgrundarlag, um teir fiskimenn, sum í dag stríðast á havinum, í staðin vóru í aðrari vinnu, sum var tryggari.

Jákup W. Hansen heldur, at soleiðis kundu vit lagt okkum eftir onkrum, sum vit ikki hava í dag – ella hava minni av.

Vit kunnu leggja aftrat, at Jákup eina tíð gekk á Fiskivinnuskúla í Vestmanna, men gjørdi seg ikki lidnan.

# Magnus stjórnar trimum virkjum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Árið í ár er ikki so gott sum í fjør, sigur Magnus Jespersen, sum er stjóri á trimum fiskavirkjum*

Nógv fólk eru ófør, bæði kvinnur og menn – hvør í sínum lagi og hvør á sínum staði.

Vit geva okkum ikki altíð far um, hvat hvør einstakur ger. Summi fólk hoyra og síggja vit lítið og einki til, hóast tey eru ógvuliga virkin. Onnur, sum takast við lítið, meyla við hvørt høvi, og tey hoyrast og síggjast alla tíðina.

### Magnus stjórnar trimum virkjum

Ein maður, sum lítið hoyrist til og ikki ger nógv burtur úr sær sjálvum, er Magnus Jerspersen á Tvøroyri, sum hevur starvast í framleiðsluvinnuni í mong ár.

Men Magnus er sera virkin maður, mugu vit siga. Hann er stjóri og stjórnar trimum fiskavirkjum – báðum virkjunum hjá Sandoy Seafood og Delta Seafood á Tvøroyri.

Spurdur, um hetta ikki er strævið og torført, sigur Magnus lítillátin, at hann hevur gott fólk undir sær, og tí letur tað seg gera.

Hann sigur annars, at árið í ár hevur verið tyngri og strævnari enn árið í fjør, og orsøkin er í fyrsta lagi lækkaði marknaðarprísurin á saltfiski.

Bæði á virkinum á Sandi og á Delta Seafood á Tvøroyri arbeiða tey næstan bara saltfisk, og tá ið marknaðurin er trekur, gongur ikki so væl.

### Minni fiskur

Magnus Jespersen sigur, at nú er eisini minni fiskur at fáa hendur á.

– Lækkaðu marknaðarprísirnir hava ført til lækkandi avreiðingarprís, og tí fer nógvur fiskur av landinum, sigur hann.

Á báðum virkjunum í Sandoynni arbeiða eini 80 fólk og eini 30 fólk á Delta Seafood á Tvøroyri.

## Vesturtúgvan og Grønanes minni túr

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Vesturtúgvan, sum trolar saman við Grønanesi, landaði 40.000 pund av upsa í Miðvági mánadagin. Grønanes, sum landaði í Vestmanna, hevði á leið somu nøgd.

Sum skilst, gekst ikki so væl hjá Vesturtúgvuni og Grønanesi hendan túrin, tí alt riggaði ikki, sum tað skuldi.

### Frí mikudagin

Tey vóru til arbeiðis á Fiskavirking í Miðvági mánadagin, og tey fara eisini til arbeiðis á virkinum í dag.

Mikudagurin er hálvur frídagur, men í Miðvági taka tey vanliga frí slíkar dagar; so hendan dagin verður einki fiskafólk til arbeiðis.

Í Miðvági vóna tey, at onkur landing verður seinni í vikuni, so tey sleppa aftur til arbeiðis hósdagin og fríggjadagin.

# Kolumbus og Nornagestur landað á Sandi

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Partrolararnir, Kolumbus og Nornagestur, landaðu tilsamans 160.000 pund á Sandi mánadagin. Meginparturin av veiðini var upsi.

Á seinasta túri hjá skipunum var upsin rættiliga góður; tað nógva var 2 og 3’arar og ein minni nøgd av 4’arum, ið er tað, sum nógvir trolarar hava fingið í vár.

Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood, visti ikki at siga, hvussu upsin hjá trolarunum var hendan túrin.

– Men seinasta túr royndu teir eystanfyri, og har var upsin ógvuliga góður.



*Snelluskipið, Antares, landar 50.000 pund á Sandi í dag*

*Mynd: Skipalistin*

### Snellufiskur

Snelluskipið, Antares, landar á Sandi í dag; teir hava 50.000 pund av upsa, og hjá snelluskipunum plagar fiskurin at vera meira smáttfallandi.

Í síðstu viku landaði lemmatrolarin, Vesturskin á Sandi. Teir høvdu roynt bæði eystanfyri og sunnanfyri, og tí høvdu teir bæði góðan upsa og smáan upsa. Tann betri upsin var at fáa eystanfyri. Vesturskin hevði 175.000 pund.

Magnus Jespersen sigur, at fiskurin hjá Kolumbusi, Nornagesti og Antares skuldi verið nóg mikið til hesa vikuna hjá báðum virkjunum í oynni, tí mikudagurin er hálvur frídagur.



# Ein oysandi Norðoyastevna

**»Tað er vakurt í Klaksvík á sumri«, sigur sangurin. Serliga summarlig var Norðoyastevnan nú ikki við oysandi regnið meginpartin av stevnuni, men vakurleikin kom tó onkuntíð til sjóndar**

NORÐOYASTEVNAN 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Í oysandi regnið varð stevnan sett fríggjakvøldið. Lítið av fólki var samankomið til setanina, og Vágstúnið var eftir lítlari løtu tómt aftur.

Fleiri av framsýningunum lótu dyrnar upp eftir setanina, og mundi hetta koma væl við hjá teimum, sum ætlaðu sær út úr fjálgu stovunum longu fríggjakvøldið, tí uttandura var bæði regn og vindur.

Í fimleikarhøllini hevði Stuðulsfelagið Dragin skipað fyri eini hugnaløtu í samband við framsýningina, sum felagið hevði skipað fyri.

Ímeðan hugnaløtan var á skránni, hoyrdist buldur og brak frá frá skúlagarðinum beint við. Her vóru ljóðroyndir til uttandura konsertina, sum skuldi verða seinni um kvøldið, farnar í gongd.

Hetta var tó ikki einasti tónleikurin, sum skuldi ljóða hetta kvøldið.

Í Christianskirkjuni luttók kórið United Voices á ungdómsguðstænastuni, og nýttu heilt fitt av fólki møguleikan til at hugna sær við eitt sindur av andaligari føði.



*Tvey fitt børn í føroyskum búnum. Myndin er tikin í dýrdarveðrinum sunnudagin*

*Mynd: Blitz foto*

Við fótbólstvøllin hevði NFÍ sett eitt tivoli upp, sum serliga børnini fingu gleði av. Men fríggjakvøldið gekk eisini stillisliga fyri seg á tivolinum, her kom ikki rættiligt lív í fyrr enn seinni á stevnuni.

Seinni út á kvøldið var skipað fyri dansi ymsastaðni í býnum, samstundis sum uttandura konsertin hjá tónleikafelagnum Sjey00 fór í gongd.

Men úti var ikki nógv at síggja. Um nakað lív var í býnum hetta kvøldið, so var tað innandura, meðan vindurin og regnið høvdu frítt um at fara eftir gøtunum.

### Vátur róður

Hæddarpunktið leygardagin var óivað kappróðurin, sum fleiri høvdu sæð fram til.

Klaksvíkar Róðrarfelag hevur eftir væl eydnaða kappingarárið í fjør ein tungan arv at lyfta, og vóru klaksvíkingar sum vera man sera spentir eftir at vita, hvussu nú mundi fara at ganga.

Leygarmorgunin var vátur, allur sum hann var, og hóast veðurfrøðingarnir høvdu lovað turrari veður út á seinnapartin, so tóktist ikki, sum um nakar hevði hug at steðga øllum hesum floyminum av regnið, sum oysti yvir býin.

Rennifelagið Treysti hevði skipað fyri rennikappingum, áðrenn kappróðurin fór í gongd, og eisini onkrar súkklukappingar vóru á skránni.

Hesi tiltøk plaga vanliga at draga nógv fólk til sín, men hesi ferð gekk alt meiri friðarligt fyri seg.

Eftir middagsleitið byrjaði norðoyastevnugestirnir av álvara at síggjast í býnum.

Tey flestu høvdu lagt leiðina beinleiðis inn í onkra kiosk, sum seldi gul regnklæði, so ikki var torført at síggja, hvørjir gestirnir vóru.

Leiðin gekk móti vestaru kei, har fólkið plagar at savnast til kappróðurin.

Men vánaligu veðurlíkindini settu eisini sín dám á kappróðurin. Vanliga er keiin full av fólki, tá kappróðurin fer í gongd, men leygardagin var ov mikið av plássi til øll.

Um 200 fólk høvdu hættað sær út í regnið, og er hetta lítið samanborið við tey mongu túsund, sum vanliga plaga at hittast til kappróðurin.

Eftir kappróðurin var aftur tómt í býnum, og vardi hetta við, líka til midnáttarsamkoman var á skránni.

Og meðan skótarnir komu gangandi niðan Vágstún við brennandi faklum í hond, sleyt hann brádliga í og vindurin legði seg. Í øllum førum eina løtu.

Eini 700 fólk vóru savnaði saman hesa løtuna, og kom rætti norðoyastevnuhýrurin nú spakuliga sníkjandi.

Eftir midnáttarrøðuna hevði Klaksvíkar Býráð skipað fyri stórum fýrverkarii og felagssangi. Góða veðrið helt sær eisini, meðan fýrverkaii var á skránni, men tá sangurin fór at runga, byrjaðu fyrstu droparnir spakuliga at detta niður av himni.

Men líka løgdu fólk í, tey vóru standandi við sanghefti í hond og sungu av allari orku. Onkur stóð enntá og sang alt sanghefti á tamb, so hetta var norðoyastevnuhýrur, sum vildi nakað.

Eftir løtuna á Vágstúni var aftur dansur ymsastaðni í býnum, og fólk fóru í hvør sína ætt.

### Sunnudagurin bjargaði øllum

Spakuliga kom sunnumorgunin sníkjandi inn um gluggarnar hjá fólki. Uttanfyri var nú blikalogn, og hevði sólin eisini hug at kaga fram.

Hetta var rættuligt norðoyastevnuveður, og nýttu fólk møguleikan til endiliga at sleppa út at halda Norðoyastevnu. Fleiri fóru eftir føroyska búnanum, og framsýningarnar í býnum fingu tær vitjanir, ið tær høvdu uppiborið.

Frálíka veðrið helt sær allan sunnudagin á tamb, og bjargaði hann hervið allari Norðoyastevnuni.

So var tað bara keðiligt, at teir flestu norðoyastevnugestirnir longu tá høvdu leitað sær heimaftur, og tískil ikki vóru staddir í Klaksvík, meðan góða veðrið var á vitjan.

# Strandferðslan og Norðoyastevnan

**Tríggjar ferjur hjá Strandferðsluni lógu við bryggju í Klaksvík Norðoyastevnuaftan, meðan kappróðurin fór fram í oysandi regni og nógvum vindi**

NORÐOYASTEVNAN 2002
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Strandferðslan hevði ilt við at avgera, hvør bátur skuldi sigla úr Havnini til Klaksvíkar á Norðoyastevnu, men tað endaði so við at verða Scania. Hon kom til Klaksvíkar leygarmorgunin um ellivutíðina við øllum róðrarfólkunum, bátunum og stevnugestum annars.

Samstundis sigldu bæði Dúgvan og Ternan um Leirvíksfjørð, so ikki kann annað sigast enn, at Strandferðslan rættiliga spílaði seg út til at syrgja fyri, at flutningsmøguleikarnir til Klaksvíkar vóru góðir. Men Dúgvan sigldi ikki fullfermd um vikuskiftið, tí helmingurin av bjargingarútgerðini var umborð á Scaniu. Hetta hevði so við sær, at fríggjadagin, meðan Dúgvan einsamøll røkti flutningin um Leirvíksfjørð, var rættiligt kaos á Leirvíkskei. Nógvar bilar sluppu ikki við, hóast bildekkið ikki var fult, tí hægsta mark fyri ferðafólki var nátt.

Men kortini, so megnaði Strandferðslan enn einaferð at gera seg ópopulera. Eftir kappróðurin er vanligt at steypahandan fer fram, og so var eisini hesu ferð. Tað dróg eitt sindur út, og klokkan mundi líða móti hálvgum sjey, áðrenn hon byrjaði.

So meðan róðrarfólkið bíðaði, fóru tey at koyra kappróðrarbátarnar umborð á Scaniu, og onnur stóðu og krokaðu umborð, meðan tey bíðaðu eftir at steypahandanin skuldi fara í gongd. Og uppaftur onnur stóðu bara á keiini í øllum regninum og bíðaðu. Men so brádliga kom panikkur í tey, sum stóðu á keiini. »Hey!! Bíða« hoyrdist onkur rópa. Tá sóu fólk, at rampin á Scaniu var veg upp, og tey, ið stóðu á keiini blivu sjálvsagt kløkk, tí tey skuldu við ferjuni. Onkur sást enntá leypa upp á rampan fyri at sleppa umborð.

Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, sum skuldi handa steypini, gjørdi skjótt av og segði, at orsakað av, at Scania skuldi skunda sær avstað, so leyp hann bara røðuna um og fór beinleiðis í gongd við at handa steyp og heiðursmerkir. Og tað gekk bara heilt skjótt fyri seg. Men av tí at onkur av róðrarfólkunum vóru í holt við at koyra teirra bát umborð á Scaniu, tá rampin fór upp, og tí ikki sluppu í land aftur, vóru tey ikki til staðar og kundu sostatt ikki taka ímóti teirra steypum ella heiðursmerkjum sjálvi, tí rampin á Scaniu fór ikki niðuraftur.

Steypahandanin mundi taka umleið tjúgu minuttir, so klokkan mundi vera farin beint av sjey, tá Eyðfinn Reyðberg hevði handað tey seinastu steypini og heiðursmerkini. Og Scania lá framvegis. Tá so steypahandanin var av, fór rampin á Scaniu niður aftur, og fólkið, sum var eftir á keiini slapp umborð.

Men ikki fyrr enn klokkan tíggju minuttir í átta fór Scania, sum, tí at hon skuldi skunda sær avstað, var orsøkin til, at steypahandanin í Klaksvík leygardagin fór fram í miklum skundi.

*Lesið viðmerkingina frá Strandferðsluni á síðu 30*

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0** grønur, 3 hurðar, árg. 2000, 27.000 km. 88.000
**Nissan Almera 1,5 Comfort** reyður, 5 hurðar, árg. 2000, 37.000 km. 112.000
**Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. 105.000
**Nissan Primera 1,6 LX** gráur, 4 hurðar, árg. 1995, 126.000 km. 69.000
**Nissan Primera 2,0** reyður, 4 hurðar, árg. 1991, 121.000 km. 47.000
**Nissan King Cab 4x4 Diesel Turbo** blágráur, 2 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. 130.000
**Nissan King Cab 4x4 Diesel** gráur, 2 hurðar, árg. 1996. 78.000
**Peugeot 106 Diesel** gráur, 3 hurðar, árg. 1996, 110.000 km. 72.000
**Peugeot 206 XR 1,4** svartur, 3 hurðar, árg. 1999, 88.000 km. 100.000
**Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. 90.000
**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.** bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. 120.000
**Opel Astra 1,7dt Van** grønur, 5 hurðar, árg. 1995, 106.000 km. 50.000
**Opel Astra 1,7Dtl** grønur, 4 hurðar, árg. 1997, 108.000 km. 99.000
**Opel Astra 1,6 Club** grønur, 4 hurðar, árg. 2000. 119.000
**Opel Astra 1,6** reyður, 5 hurðar, árg. 1999, 52.000 km. 119.000
**Opel Astra 1,6** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. 105.000
**Opel Astra 1,7 Wagon** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 142.000 km. 55.000
**Opel Vectra 1,4** hvítur, 4 hurðar, 26.000
**Opel Vectra 1,8** bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 29.000 km. 129.000
**Opel Vectra 2,0 Di** bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 96.000 km. 130.000

Sosialurin

**Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61